# Hin navnleysa søgan




**Nýggj barnabók eftir Heina Hestoy er útkomin. Bókin er skrivað saman við børnum í Velbastaðar skúla**

BÓKAÚTGÁVA

Nýggj bók eftir Heina Hestoy er komin í bókabúðirnar. Bókin er skrivað saman við børnum av Velbastað.

Bókin er 64 síður við myndum eftir Róa Einarsson.

Hin navnleysa søgan er úrslitið av einari hugnaligari løtu í Velbastaðar skúla í august 1998, har Heine lúttók saman við næmingum og lærarum.

Nógv varð tosað um bøkur og ymiskar søgur, og til endans varð gjørt av saman at skriva eina søgu, har hvør einstakur hevði sín leiklut og hvør sær skuldi hava høvi at ávirka gongdina.

Søgan varð skrivað í brotum og send børnunum, sum lósu hana og síðani skrivaðu bræv við uppskotum til broytingar.

Burturúr hesum samstarvi kom henda spennandi og ótrúliga søgan, sum bert kann fara fram í hugaheiminum hjá børnum og barnsligum rithøvundum.

Bókin er prentað og bundin hjá Hestprent.

# »Teir sjey svanirnir« á fløgu

**Nýggj fløga við føroyskum ævintýrum**

FLØGUÚTGÁVA

Seinasta útgávan hjá Tutli í ár kom út í gjár. Hetta er ein fløga, ið eitur »Teir sjey svanirnir«, og hon er ein endurútgáva av bandinum við sama heiti, ið kom út fyri trimum árum síðani.

Á fløguni eru átta føroysk ævintýr, ið Jakob Jakobsen og Símun av Skarði savnaðu saman ymsastaðni í landinum móti endanum á 19. øld. Ævintýrini eru "Vakurleikin og beistið", "Kongaríkið Verðsins Endi", "Drongurin, ið burturtikin varð av havfrúnni", "Krákudóttir og Kalsdóttir", "Revur og bjørn", "Øskudólgur", "Skræddi kjálki" og "Teir sjey svanirnir". Tey snúgva seg, sum vera man, um bæði líkt og ólíkt. Tað er Kári Sverrisson, ið lesur ævintýrini og spælir tónleikin, ið er á fløguni.

Upptøkurnar vórðu gjørdar í sambandi við barnasendingar í Útvarpi Føroya fyri fýra árum síðani.

Bárður Jákupsson hevur gjørt kápumyndina.




# Nýggj Joka-fløga




FLØGUÚTGÁVA

Nýggj fløga við bólkinum JOKA er komin í handlarnar. Á fløguni eru fýra spildurnýggj JOKA løg - Hold me Tight (orð: Graham Stewart/lag: Jóhannus á Rógvu Joensen) - Ver hjá mær (orð: Steintór Rasmussen/lag: Karl Martin Samuelsen) - Shining Light (orð og lag: Heri Nolsøe) - Lívið vaknar (orð: Heri Nolsøe/ lag: Jóhannus á Rógvu Joensen).

Har afturat eru kend og vælumtókt løg sum til dømis Tú bar mær ta sól (orð: Sigmund Poulsen/lag: Jóhannus á Rógvu Joensen), Torvatrøllið (orð og lag: Karl Martin Samuelsen). Á fløguni eru 12 frálíkir og spennandi sangir tilsamans.

†

**Vilhelm Nielsen**

í Sandavági andaðist á Landssjúkrahúsinum 18. desember, 90 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju leygardagin 21. desember kl. 14.00

**Marianna, Pauli, Sólgerð, Sofus og Ann**

# Tórbjørn Olsen sýnir fram í Glas & List



LISTAFRAMSÝNING

Tórbjørn Olsen, listarmaður, sýnir í hesum døgum fram málningar í handilshølunum hjá Glas & List við Sundsvegin í Havn.

Glas & List er í bygninginum hjá Føroya Termovirki, har Per á Hædd, fotografur, eisini hevur sítt atelier.

†

Kunngjørt verður at

**Fanny Marie Petersen**
Klaksvík

andaðist 18. desember, 94 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum heim í Christianskirkjuna fríggjadagin 20. desember kl. 18.00. Jarðarferðin úr leygardagin 21. desember kl. 13.00.

**Óli og Herman**

# Nýggj mynd



Í blaðnum í gjár prentaðu vit eina grein um fjarlesararnar á Føroya Handilsskúla og Robert Gordon University. Tíðanverri fingu vit ikki eina nýggja mynd av teimum til blaðið og máttu í staðin nýta eina eldri mynd av flokkinum.

Hesa myndina hava vit fingið sendandi frá Graeme Slaven á Robert Gordon University, sum umboðaði skúlan á hátíðarhaldinum.

Myndin er tikin á Hotel Hafnia um vikuskiftið í sambandi við hátíðarhaldið hjá fjarlesarunum. Á myndini eru eisini umboð fyri Handilsskúlan, bretski konsulin og umboð fyri BP.

-HR



# Havnargenta millum verkfalsfólk í Venzuela

**Guðrun Michaelsdóttur Egholm úr Havn fekk eina heldur óvanliga uppliving, tá hon sum AFSari fór til Venzuela í heyst. Eftir eina tíð tók seg upp álvarsligt stríð í landinum millum stóran part av fólkinum og forsetan og hevur aðalverkfall lagt landið heilt lamið. Guðrun, sum mátti vera innandura í nærum tríggjar vikur, er nú á veg heimaftur.**

AFS
*Jan Müller*



*-Fólkini her eru so ómetaliga fitt, opin, góð og smílandi sigur Guðrun, sum vónar at sleppa aftur til Venzuela í janaur*

Tað, sum skuldi verða ein uppliving fyri lívið, gjørdist ein øðrvísi uppliving, enn tann, sum 18 ára gamla havnagentan, Guðrun Michaelsdóttur Egholm, hevði roknað við. Hon fór í heyst til suðuramerikanska landið Venzuela sum AFSari úr Danmark, har hon gongur í studentaskúla. Teir fyrstu mánaðirnir av hesi nýggju tilveruni hjá Guðruni gingu uttan, at nakað óvanligt hendi. Hon hevði tað gott hjá nýggju familjuni í stóra oljubýnum Maracaibo har norðuri í landinum. Pápin er lækni og mamman professari í biokemi. Saman við teimum og teimum báðum nýggju systkjunum gjørdi Guðrun seg út til eitt spennandi og fruktagott ár í hesum úr Føroyum so fjarskotna landinum. Men alt skuldi ikki ganga, sum Guðrun og hennara nýggja familja høvdu ætlað.

Herfyri tók seg upp rættiligt rok í landinum ella serstakliga í høvuðsstaðnum Caracas. Lýst varð til aðalverkfall og mótmælisgongurnar taldu skjótt fleiri hundraðtúsund verkfalsfólk í gøtununum í høvuðstaðnum. Fakfólkini og ein stórur partur av fólkinum krevur, at Chavez forseti leggur frá sær, men tí noktar hann fyri. Hann var annars nettupp valdur av fakfelagslimum og teimum fátæku í landinum, tí hann lovaði at bøta um teirra kor. Men gongdin hevur verið beint tann øvugta. Gonzalo, venzuelski pápin hjá Guðruni sigur við Sosialin, at Chavez er kommunistur og ein av vinmonnum Fidel Castro. Hann lovaði at betra um støðuna í landinum men hevur einki gjørt, og tí má hann taka avleiðingarnar av tí og fara frá.



*Frá móttmælisgongunum í Caracas.*

Aðalverkfallið hevur lagt alt landið lamið,og oljuframleiðslan, sum er tann fimt størsta í heiminum, er heilt steðgað upp, og bæði bensin, olja og matvørur eru rationereaðar. Hetta hevur Guðrun merkt og hevur hon verið noydd at halda seg innandura seinastu vikurnar. Hon og systkini, ein beiggi uppá 12 ár og ein systur uppá 17 ár, eru ikki sloppin í skúla hesa tíðina, og støðan er bara versnað. Tey hava tó ikki liðið nakra neyð. Verkfalsfólkini vilja ikki gevast við sínum tiltøkum, sum Guðrun sigur eru friðaligar mótmælisgongur, ið hon eisini hevur verið við til. Hinumegin vil forsetin heldur ikki leggja frá sær, tí hann er demokratiskt valdur, so tað er heilt óvist, hvat endin verður á hesum stríði, ið er við at hótta allan landsbúskapin. Guðrun sigur, at meirilutin av fólkinum vil hava forsetan at fara frá í stundini, tí hann hevur ikki megnað at vent gongdini í samfelagnum, heldur øvugt er hann orsøkin til, at búskapurin gongur verri og verri. Guðrun var við til eina friðaliga mótmælisgongu í Caracas, har tey klamsaðu við grýtulokum. Hóast stóra álvaran var hetta eisini ein uppliving fyri hana.

Tá Sosialurin tosaði við Guðrun í vikuni hevði hon fingið boð frá altjóða skrivstovuni hjá AFS, um at bíleggja ferðaseðil heimaftur. Somu boð hava allir hinir 15 AFS-ararnir í Maracaibo fingið. Soleingi støðan er so mikið spent verður hildið, at tað er best fyri tey ungu, at tey fara aftur til síni heimlond. Mett verður at støðan kann skerpast uppaftur meira, nú hvørgin av pørtunum vil geva seg. Støðan er kanska ikki so akutt og álvarslig beint nú, men man ber ótta fyri, hvat kann henda, um støðan stendur við og versnar. Guðrun sigur, at broytist støðan aftur, so hava tey fingið lyfti um, at tey kunnu fara aftur til Suðuramerika í januar.

## Øll eru so opin og glað

Men síggja vit burtur frá hesi heldur óvanligu hending, hvussu dámar so henda unga havnagentan fólkið og landið í hesum fjarskotna heimspartinum! - Mær dámar sera væl. Serliga fólkið her. Tey eru so smílandi, opin og fyrikomandi og glað. Alt tað góða, sum tú kanst siga um fólk, kann eg siga um tey. Hví so er hevur Guðrun sína egnu teori um. - Eg haldi tað er tað góða veðrið, sólin, sum er orsøkin til, at tey eru so glað og so løtt at tosa við. Guðrun dámar eisini væl skúlan. Hon er eitt sindur kedd av nú at skula fara heimaftur, tí tað er nústaðni, at hon er farin at innliva seg meira í spanska málið í skúlanum. Hon hevur annars altíð havt ætlanir um at læra spanskt.

Guðrun býr í dag í Danmark. Hon fór eftir 9. flokk til Odense saman við mammu síni. Har gongur hon á studentaskúla. Tað seinasta vit frættu frá Guðruni var, at hon hevði pakkað kuffertið og gjørdi klárt til at fara við flogfari til Miami í Florida og víðari til Amsterdam og Keypmannhavn.



*Guðrun úr Havn saman við nýggju familju síni í Maracaibo í Venzuela*

TELEBÚÐIN

Soleiðis hava vit opið um jólini

| | Tórshavn | Saltangará | Miðvágur | Klaksvík | Tvøroyri | Sandur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagur 20.12 | 09.00-20.00 | 09.00-20.00 | 09.00-20.00 | 09.00-20.00 | 09.00-20.00 | 13.00-16.00 |
| [redacted] | 10.00-20.00 | 09.00-20.00 | 09.00-20.00 | 10.00-20.00 | 10.00-20.00 | Stongt |
| | 14.00-20.00 | 14.00-20.00 | Stongt | Stongt | Stongt | Stongt |
| | 09.00-22.00 | 09.00-22.00 | 09.00-22.00 | 09.00-22.00 | 09.00-20.00 | 13.00-16.00 |
| | Stongt | Stongt | Stongt | Stongt | Stongt | Stongt |



Fyrivarni verður tikið móti prentvillum

[redacted]rshavn 17010 Norðstreymoy 421000 Miðvágur 332000 Klaksvík 457488 Sandur 361000 Tvøroyri 371000 Saltangará 404400

FØROYA TELE